# Kular Røtur við fullari ferð

*Leygardagin hava vælumtóktu Kular Røtur konsert á Kambsdali*

Eyðun Klakstein

Eftir tvær fløguútgávur, eina sjónbandaútgávu og fleiri væl eydnaðar konsertir, eru Kular Røtur vorðnar eitt hugtak í føroyskum tónleikalívi.

Bæði á Norðoyastevnu og á Jóansøku vóru nógv fólk til konsertirnar hjá teimum, og leygardagin fara røturnar úr Klaksvík at spæla á stórari konsert á Varmakeldustevnu.

Seinna fløgan hjá Kulum Rótum, sum kom út fyrst í hesum mánaðinum, hevur selt so væl, at útgevararnir nú fara at uppafturprenta fløgurnar. Tær 1500 fløgurnar, sum vóru gjørdar í fyrstu syftu, eru við at verða útseldar, og hóast bara góðar tríggjar vikur eru síðani útgávudagin, verður nú neyðugt at fáa fleiri fløgur framleiddar.

Á konsertini, sum verður í ítróttarhøllini á Kambsdali leygardagin, er nógv á skránni. Fyrst og fremst snýr tað seg um sangirnar, sum fólk kenna frá teimum báðum fløgunum, men harafturat verður eisini stórt myndashow á stórskíggja, skemt, dansigentur og ókeypis Pop-Top og ballónir.

Tann øðiligi Trølla-Pætur verður eisini við á konsertini, og hann fer at syngja onkran sang fyri áhoyrarunum.

Men annars kunnu fólk hoyra sangir sum H*on er omma mín, Hundur mín Kingoson, Abbabeiggi úr Amerika, Bilurin hjá okkum, Nósi* og aðrar sangir.

Alt samalt í einum stórum familjutiltaki í ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið klokkan 19.00.



*Rannvá Lützen er ein av sangarunum í Kulum Rótum*
***Mynd: Jonhard Hammer***

# Hanus á heimavølli

*Sunnudagin fer Hanus Johansen at hava konsert í Klaksvík*

Eyðun Klakstein

Hann verður einsamallur við gittarini. Júst sum tá alt tað byrjaði í Klaksvík í 60'unum.

Hanus Johansen, sum júst hevur hildið 50 ára føðingardag, og í tí sambandi er fløguaktuellur, fer sunnudagin at hava konsert í Klaksvík.



Tað er fløgu- og bókahandilin Leikalund, sum skipar fyri konsertini, og Hanus fer at spæla í høl-unum hjá Norðoya Fornminnissavni.

Tað sleppa út ímóti 100 fólk til konsertina, og atgongumerki kunnu frammanundan keypast í Leikalund.

Nýggja fløgan hjá Hanusi Johansen, har hann spælir síni løg saman við Aldubáruni, gongur væl, og tað er í sambandi við hesa útgávuna og fimti ára føðingardagin, at Hanus aftur verður at hoyra í Klaksvík.

Konsertin verður sunnudagin klokkan 17.00.




*Hondverkarar eru í ferð við at tøma alt innan úr brenda bygninginum hjá Com-Data. Ein hædd er eisini rivin niður, og nú skal kannast, um tað verður neyðugt at ríva restina av betonginum niður*

# Tøma brenda bygningin

*Tá bygningurin hjá teldufyritøkuni Com-Data, sum brendi herfyri, er tømdur, verður støða tikin til, um betongið skal rívast niður*

Eyðun Klakstein

Í løtuni eru hondverkarar í holt við at tøma bygningin hjá teldufyritøkuni Com-Data, sum brendi fyri nøkrum vikum síðani.

Alt verður tikið innan úr bygninginum, og tá tað er gjørt, fara fólk frá trygg-ingini at kanna, um betongið kann verða standandi og brúkast aftur. Um betongið eisini hevur fingið skaða, verður tað rivið niður.

Stjórin á Com-Data, Oliver Thomsen, sigur, at teir ætla at byggja bygningin aftur, men enn er ógreitt, hvørjum líki hesin bygningur verður í. Tað veldst millum annað um, um betongið skal brúkast aftur, ella um tað skal rívast niður eisini.

Com-Data hevur tveir bygningar, og tað var tann norðari av teimum, sum brendi í ógvusliga eldsbrunanum. Tann sunnari bygningurin hevur ongan skaða fingið, men hesin bygningurin er ikki nóg stórur til at hýsa øllum virkseminum hjá fyritøkuni.

– Í løtuni er tað rættiliga trongligt hjá okkum, og vit sita fleiri á hvørjum kontóri, sigur Oliver Thomsen.

### Halda til í tveimum bygningum

Eftir eldsbrunan hevur Com-Data eisini leigað sær skrivstovuhøli hjá JFK Trol við Garðavegin, og har hava nøkur fólk havt skrivstovu síðani. Hini fólkini halda til í sunnara bygninginum við Stangavegin.

– Umstøðurnar at arbeiða undir eru ikki tær bestu í løtuni, og tí vilja vit hava ein nýggjan bygning upp at standa norðanfyri skjótast gjørligt, sigur Oliver Thomsen.

### Ikki í fýra hæddum aftur

Hann sigur, at ætlanin er, at nýggi bygningurin norðanfyri verður bygdur fastur í tann sunnara bygningin, og at ein inngongd skal vera millum báðar bygningarnar.

Tá Com-Data fer at byggja aftur norðanfyri verður tað neyvan í fýra hæddum, soleiðis sum tann gamli bygningurin var. Tað verður helst ein hædd minni, men hvussu bygningurin kemur at síggja út, verður støða ikki tikin til, fyrr enn tað er greitt, um betongið í gamla bygninginum skal brúkast aftur.

Knapt 20 fólk starvast dagliga á teldufyritøkuni Com-Data, sum hevur lagt seg eftir at gera serloysnir til vinnulívið.

# Altjóða avtalur skulu steðga dálking

Eyðun Klakstein

Skal dálkingin avmarkast og steðgast, so skal tað gerast gjøgnum altjóða avtalur um at steðga nýtsluni av umhvørviseitrandi evnum.

Hetta segði Eyðun Elttør, landsstýrismaður við umhvørvismálum, á ráðstevnu hjá norðurlendska Ráðharraráðnum fyrst í vikuni. Ráðstevnan var um matvørur.

Eyðun Elttør luttók á ráðstevnuni fyri Føroyar, og hann vísti serliga á, at føroyska fólkið í øldir hevur livað av tí, sum havið gav, og at broyttir kostvanar og tann umfatandi dálkingin ger, at føroyingar mugu vera meira varnir við, hvat teir eta.

– Men tað hevur týdning, at fólk sjálvi hava møguleika at veiða og gera matin til, segði landsstýrismaðurin.

### Dálking í hvali ein ávaring

Hann vísti á, at norðurlendska samstarvið er av stórum týdningi í arbeiðnum at gera altjóða avtalur, sum kunnu steðga útbreiðsluni av umhvørisskaðiligum evnum. Hesar altjóða avtalur eru loysnin á dálkingartrupulleikanum, og longu nú eru onkur úrslit at síggja av hesum arbeiði, segði Eyðun Elttør.

– Tað er umráðandi at síggja ta dálking, sum vit síggja í til dømis hvali sum eina ávaring um, hvat kann enda við øllum tí livandi tilfeingi, vit hava, um einki verður gjørt.

Eyðun Elttør segði eisini, at tað er um umráðandi at styrkja tað norðurlendska arbeiðið á hesum økinum. Hann vísti á, at ráðharrar og brúkarar hava eina felags ábyrgd av, at matvørurnar ikki verða oyðilagdar av dálking og manglandi matvørutrygd.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður*

# Aria spæla á Kambsdali

Poppbólkurin Aria fer at spæla til dans í ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið.

Bólkurin úr Klaksvík, sum fyri einum góðum ári síðani gav eina fløgu út, hevur ikki spælt nógv seinastu tíðina, men í summar verður helst eitt sindur at hoyra til bólkin.

Onkur av limunum í Aria eru búsitandi uttanlands, men leygarkvøldið verður allur bólkur samlaður, tá teir fara at spæla til stóra dansin á Varmakeldustevnu.

Í Aria eru Jógvan Hansen, Ólavur Wolles, Erik Biskopstø, Magnus Husgaard og Petur Hans Niclasen.



# Enn eitt mál um siðamisbrot

*Løgreglan er í løtuni í holt við at kanna enn eitt mál um siðamisbrot. — Enn er málið ikki búgvið til ákæru, men tað verður ikki so leingi áðrenn ákæra verður reist, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini*

Sveinur Tróndarson

Kriminalløgreglan er enn einaferð í ferð við at kanna eitt mál um siðamisbrot. Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini í Havn, váttar, at teir eru í holt við eitt mál.

- Talan er um eitt »gamalt« mál. Nakað, sum er farið fram fyri tíð síðani og sum nústani er meldað, sigur Bergleif, sum greiðir frá, at løgreglan er við at vera liðug við kanningarnar. Tá tað arbeiðið er liðugt, verður ákæra reist móti tí skuldsetta.

Er nakar handtikin í málinum?

- Eingin er handtikin, men vit hava avhoyrt fólk í málinum, og ein persónur er skuldsettur, sigur Bergleif Brimvík.

Tað er einki yvir at dylja, at tað hava verið nógv mál um siðamisbrot her á landi í seinastuni, men sambært løgregluni, so er tað ikki tí, at tað verða framd fleiri siðamisbrot í Føroyum. Orsøkin er harafturímóti, at fólk - offur, og tey kring tey - eru meira tilvitað um tað, sum er framt móti børnunum og lata tað koma fyri ein dag.

- Fjølmiðlarnir í Danmark gera nógv við slík mál, og tað økir um tilvitanina um siðamisbrot. Til dømis hava fleiri sendingar verið í sjónvarpinum, har ljós verður varpað á siðamisbrot av einum og øðrum slagi, og tað ger, at fólk hugsa meira um tað, sigur Bergleif.

Mangan hevur verið tikið til, at tað er meiri enn trupult hjá teimum, sum hava verið úti fyri slíkum, at tosa um tað, og tað er ikki ókent fyri løgreglumanninum. — Nógv av málunum koma ikki undan kavi, fyrr enn fleiri ár aftaná at lógarbrotið er steðgað. Tað ger tey ikki minni viðkomandi, men tað vísir, at tað er serliga viðkvæmt at tosa um eitt slíkt mál, sigur Bergleif Brimvík.

# Sløkkiliðið á Skálafjørðinum 25 ár

*Mánadagin 22. mai var liðin fjórðingsøld, síðani skálamenn mannaðu sín part av sløkkiliðnum á Skálafjørðinum. Stutt frammanundan høvdu fýra kommunur gjørt av at stovna eitt felags sløkkilið og fyri skálamenn hevur eftir øllum at døma verið talan um eitt gott arbeiðspláss, tí enn hevur bert ein av átta lagt frá sær*



Sveinur Tróndarson

Øll ræðast tankan um eld og tann skaða hann kann gera. Men kortini eru nógv, sum dagliga starvast við at berjast móti hesum henta tænara, sum kortini kann gerast so vandamikil, tá ein ikki hevur tamarhald á honum.

Í størru býunum, t. d. í Havnini, er starvið, sum sløkkiliðsmaður, fulltíðarstarv, men á Skálafjørðinum er sløkkiliðið, enn sum áður, meiri og minni sjálvboðin arbeiðsmegi.

### Felags fyri allan fjørðin

Tað var í apríl mánaði í 1975, at tær fýra kommunurnar við Skálafjørðin, Runavíkar, Tofta, Stranda og Skála kommuna samdust um at stovna eitt felags sløkkilið undir heitinum Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið, stytt SKS.

Fyrsti bilurin fekk basa á Skála, meðan onkrar av hinum kommununum høvdu buss við sløkkiútgerð tøkan. Seinni er ein sløkkibilur komin í Runavík, og tað gevur borgarunum eina betri trygd.

Tann 22. mai í 1975 heitti bygdarráðið á Skála á átta menn um at taka á seg starvi sum sløkkiliðsmaður. Teir vóru Andras Hansen, Petur Christian Rasmussen, Kaj Olsen, Hilmar Joensen, Jóannes Thomsen, Dánjal J. Joensen, Dánjal Jacobsen og Ólavur Berg.

Hesir menninir átóku sær uppgávuna og væl man hava borið til at samstarvað, tí teir eru allir, uttan ein, í starvi enn. Dánjal Jacobsen mátti fyri góðum fimm árum síðani leggja frá sær av heilsuávum, og í hansara stað kom Vilhelm M. Olsen.

### Sera gott samstarv

Tað er Jóannes Thomsen, sum er leiðari fyri sløkkiliðið á Skála, og hann minnist, at tað var eitt sindur buldrasligt tað fyrsta árið.

- Vit høvdu ikki færri enn átta útrykningar tað fyrsta árið. Eg haldi, at fólk ynsktu sløkkiliðið har pipari grør, tí knappliga fór alt at brenna, sigur hann og smílist.

Síðani hevur verið eitt sindur meira lagaligt.

Samanlagt heldur hann, at sløkkiliðið á Skála hevur verið úti upp í móti 100 ferðum, og tað er ikki alt, sum hevur verið so tespiligt.

- Nei, fór ólukkan, sigur hann.

Síðani sløkkkiliðið varð stovnað, eru arbeiðsuppgávurnar broyttar rættiliga nógv. Í fyrstani var fyri tað mesta talan um sløkkiuppgávur, og tá var tað um allan fjørðin. Soleiðis er tað ikki heilt í dag, tí nú halda teir seg á vestara armi, um ikki teir fáa boð úr Runavík at koma at hjálpa. Samstundis leggjast aðrar uppgávur til, so í dag virkar sløkkiliðið líka nógv, sum eitt bjargingarfelag.

- Nú fáa vit áheitanir um at pumpa skip ella at hjálpa til, tá stormskaðar eru, og tað gera vit fegnir. Tað skal ikki misskiljast, men vit hava ikki havt alla ta neyðugu útgerðina, men tað er við at koma, sigur hann.

Eitt annað, sum ger tað lættari at vera sløkkiliðsmaður í dag eru brandpostarnir.

- Í byrjanini var ikki ein brandpostur og tá máttu vit demma í áum og pumpa úr sjónum, tá vit vóru úti. Nú eru brandpostar so at siga allastaðni og tað ger tað meira arbeiðsligt, sigur Jóannes.

### Allir arbeiddu á Skála

Tað er eingin loyna, at tíðirnar eru nógv broyttar hesi 25 árini síðani SKS varð stovnað. Hetta merkist eisini á sløkkiliðnum á tann hátt, at tað ikki er so lætt at fáa fatur á sløkkimonnunum, sum tað var fyrr.

- Í »gomlum« døgum arbeiddu næstan allir sløkkiliðsmenninir á vestara armi á skipasmiðjuni, men tað gera teir ikki longur. Tá var næstan nóg mikið at ringja á Skipasmiðjuna, tí so nógvir mans vóru har, men í dag ferðast nógvir við arbeiðinum, og tað ger tað eitt sindur truplari, greiðir Jóannes Thomsen frá.

Kortini vísa menn ein sera stóran vilja at vera við í arbeiðinum. Men hóast vilja og evnir, so kunnu nakrir í sløkkiliðnum á Skála ikki renna undan, at tað um ikki so langa tíð verður brúk fyri nýggjum monnum og Jóannes vónar, at aðrir standa til reiðar at taka yvir.

- Onkrir okkara fara um ikki so langa tíð at leggja frá okkum, og so vóna vit, at tað ber til at fáa nýtt fólk, sigur hann.

Umstøðurnar eru eisini eitt sindur batnaðar, tí í dag fáa sløkkiliðsmenninir eina fasta samsýning um mánaðin, um hon ikki er so stór.

- Fyrr fingu vit fyri mista arbeiðstíð tá vit vóru úti í sløkkiørindum og tá vit høvdu venjingar, greiðir Jóannes frá.

### Venja eina ferð um mánaðin

Tað sigur seg sjálvt, at tá tú arbeiðir sum sløkkiliðsmaður, er tú noyddur til at halda vitanina við líka og kanna um útgerðin virkar sum hon skal. Tað gera teir eisini og í miðal hava teir eina venjing um mánaðin.

- Um veturin er eingin trupulleiki at savna fólk til venjingar, tí tá eru teir flestu heima. Men um summarið kann tað vera meira trupult, tí tá hendir tað seg meiri enn so, at menn fara á flot. Men tað mugu teir eisini hava loyvið til og tí hava vit avtalað nær venjingarnar skulu vera. Tað ger tað lættari at halda skil á hjá øllum, sigur Jóannes.

Og m. a. tí kunnu fjarðbúgvar sova trygt um náttina við vitanini um, at hendir okkurt, eru sløkkiliðsmenninir í SKS til dystin fús. Báðu megin fjørðin…

